VINNUMÁLARÁÐIÐ

KT-FYRISITINGIN

## Søkt verður eftir fulltrúa til KT-fyrisiting

Vinnumálaráðið søkir eftir einum fulltrúa til KT- fyrisitingina.

KT- fyrisitingin er ein deild í Vinnumálaráðnum, ið tekur sær av kunningartøkniligari samskipan innan landsfyrisitingina sum heild, harímillum at røkja uppgávur viðvíkjandi KT- trygd o.ø.

**Starvið:**
KT-fulltrúin skal samskipa og leggja til rættis arbeiði við menning av prosessum hjá KT-fyrisitingini, harundir at innføra fyrisett mál, so sum Microsoft Operational Framework (MOF), IT Infrastructure Library (ITIL), Cisco SAFE og at gera og dagføra politikkir og mannagongdir viðvíkjandi trygd.

Talan er um eitt nýtt starv í eini rættiliga nýggjari fyrisiting, og skal tann, sum settur verður, tola møguligar broytingar í starvsinnihaldinum.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta okkum av umsøkjarum, at teir hava:

- Hægri útbúgving, so sum cand. IT., cand. merc. (dat), KT-verkfrøðingur ella aðra viðkomandi hægri útbúgving
- Kunnleika og royndir innan EDV og almenna ella privata fyrisiting
- Góð samstarvsevnir
- Hollan kunnleika til føroyskt, danskt og enskt

**Vit bjóða:**
Vit bjóða eitt fjølbroytt, spennandi og avbjóðandi starv í einum umhvørvi á høgum fakligum stigi, ið tú sjálv/sjálvur verður við til at skapa. Til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við nógvum samskifti úteftir. Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har tú fert at arbeiða í tøttum samstarvi við politisku myndugleikarnar, áhugabólkar í samfelagnum og starvsfólkini hjá landsfyritøkuni. Góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgvingum.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Setanin umfatar Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt onnur aðalráð.

**Umsóknir:**
Umsóknir við prógvum, CV o.ø. skulu sendast til:

***Vinnumálaráðið***
*Tinganes*
*Postsmoga 377*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu vera Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. mars 2007. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Gunnar Toftegaard, tlf. 356078.

## Trygdarvørður

(Vaktarmaður)

Søkt verður eftir ágrýtnum og álítandi persóni at røkja starv sum trygdarvørður hjá ANSNI Trygdarfelag.

Umsøkjarar skulu hava koyrikort til persónbil, eins og rein revsiváttan er ein treyt.

Fyri rætta persónin er talan um avbjóðandi starv á kvøld/náttartíð í Tórshavn, eins og møguleiki er fyri skeiði á trygdarskúla í Danmark.

Nærri upplýsingar fáast á tlf. 505061 (stjórin) og 505060 (vaktleiðarin).

ANSNI Trygdarfelag, Geitagerði 7, Tórshavn, postsmoga 2032, 165 Argir, tlf. 505050 og 315061, www.ansni.fo. ansni@ansni.fo

ANSNI
TRYGDARFELAG

POSTBOKS 2032 • 165 ARGIR
Telefon 505050 / 505061

Um ANSNI Trygdarfelag: Hvørt kvøld fara trygdarvørðar til arbeiðis á fýra ymiskum leiðum í landinum. Talan er um Klaksvík, Eysturoy, Norðstreymur og Tórshavn. Vit hava eftirlit við virkisbygningum, skúlum, skipum o.ø. Afturat ANSNI Trygdarfelag er ANSNI Tøkni, ið burturav tekur sær tøkniligum uppgávum, m.a. sjónvarpsskipanum, alarmum o.ø. Íalt eru vit 12-14 starvsfólk.

## Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður leygardagin 17. mars 2007 kl. 10.00 á Hotel Føroyum smbrt. viðtøkum felagsins við hesi dagsskrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Val av atkvøðuteljarum
3. Góðkenning av dagsskrá
4. Góðkenning av starvsskipan
5. Frágreiðing formansins
6. Framløga av rammufíggjarætlan og roknskapi, harímillum áseting av limagjaldi
7. Innkomin uppskot
8. Val av tveimum grannskoðarum
9. Ymiskt

**Uppskot, sum skulu verða viðgjørd á aðalfundinum, mugu vera felagnum í hendi 1. mars 2007**

Morgundrekka fæst frá kl. 09.30. Fundurin byrjar kl. 10.00 stundisliga.

Eftir fundin, á middegi verður okkurt til matna.

Tilmelding er neyðug til aðalfundin, og skal tilmeldast á skrivstovu felagsins í seinasta lagi týsdagin 13. mars kl.13.00.

**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**
Lucas Debesargøta 14 · Postboks 1285
FO - 110 Tórshavn · tlf. - 298 311309
Fax 316272 · sff@sff.fo · www.sff.fo



## Framsýning av DNG C6000I snelluni

Í samband við útróður verður ein framsýning av Íslendsku DNG C6000I snelluni, línuspølun & meira. Fólk frá DNG er við, og har tit hava møguleika at fáa meira at vita, og kunnu seta spurningar.

Framsýningin verður tann 3. mars kl. 11-17 í hølinun hjá Fa. Jóannes F. Dahl, Norðskála.

**Fa. Jóannes F. Dahl**
**Maskinsmiður & Umboð fyri Vaki-DNG**
Mýruvegur 10. · FO- 460 Norðskála · Føroyar

## Ársfundur

fyri limirnar í FK handlunum í Tórshavn og Hoyvík

verður í FK handlinum í Hoyvík

**mikukvøldið 14. mars 2007 kl. 19.30**

Fundarskrá: Sambært viðtøkunum

Allir limir er vælkomnir at møta.

***Limanevndin***

**Føroya Keypssamtøka**



## Lastbilur til sølu

Volvo F12 til sølu um hóskandi boð fæst

Bilur frá 1997, wejrheis, 27 t/m Palfinger-krani

**Telefon 585400**

## Frisørsveinur søkist

Frisørsalong í Havn, søkir svein at leiga stól.

Áhugaði kunnu skriva til **bill. mrk. 23020701.**